# Ferguson heldur lítið um Dowd

Manchester United tapti leygardagin ímóti Fulham. Tvey mál fóru ígjøgnum hjá United, og tveir spælarar vórðu vístir út – Paul Scholes og Wayne Rooney. – Dómarin var nærhendis støðuni, so hann kundi latið verið við at givið Scholes reyða kortið. Men hatta var Phil Dowd, so hvat annað kann væntast, sigur Sir Alex Ferguson speiskliga. Hann helt eisini lítið um seinna gula kortið, sum Wayne Rooney fekk.



# Bilur steðgaði dysti

Dysturin millum Tottenham og Chelsea var seinkaður ein hálvan tíma, tí okkurt illgrunasamt var við einum bili, sum stóð parkeraður við White Hart Lane-leikvøllin. Løgreglan kannaði bilin, og tá staðfest var, at eingin vandi var á ferð, kundi dysturin byrja. Eitt mál kom í dystinum, og tað fekk Tottenham.

# Revsaðir fyri øll mistøk

**– Okkara størsti feilur var, at vit ikki kláraðu at halda konsentratiónina í seinna parti av báðum hálvleikunum. Gjørdu vit eitt mistak, revsaðu sveisararnir tað beinanvegin, sigur toppskjúttin hjá Føroyum, Heini Hanusarson.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hóast Heini Hanusarson enn eina ferð gjørdist føroyskur toppskjútti – hesa ferð við átta málum – var hann verri enn so nøgdur við tað, sum hann og liðið avrikaðu ímóti Sveis leygarkvøldið.

– Gamaní, skjeyt eg átta mál í dystinum, men eg brendi so sanniliga eisini nógv, er erliga staðfestingin frá kollfirðinginum, sum fekk sjey av sínum átta málum fyri steðgin og enn eina ferð við sínum málum var høvuðsorsøk til, at føroyska byrjanin ikki sá so galin út.

– Okkara størsti feilur var, at vit ikki kláraðu at halda konsentratiónina í seinna parti av báðum hálvleikunum. Gjørdu vit eitt mistak, revsaðu sveisararnir tað beinanvegin. Og hinvegin, so megnaðu vit ongantíð at leggja stórvegis trýst á teir.

Hann nevnir sum dømi um vantandi konsentratión, at fleiri føroyskir kjansir, ið áttu at givið mál, blivu søplaðir burtur:

– Vit gjørdust ofta so bilsnir av at vera fríir ímóti sveisiska málinum, at vit púrasta gloymdu at hyggja at málmanninum, sum tí aftur hesa ferð hevði yvirtakið á okkum, sigur Heini, sum hevur ilt við at síggja nakað frá dystinum, sum føroyska liðið kann byggja víðari á.

– Tá vit so fáa ein slíkan avsmurning, sigur tað seg sjálvt, at har er ikki nógv, vit fáa brúkt til nakað. Men vit hava so verið saman í tríggjar dagar, og tað er gott. Somuleiðis er tað positivt, at vit fylgja teimum ta fyrstu løtuna, men tað er so tað. Sveis er bara hetta betri enn vit, og tað vísir okkum, at hetta er hondbóltur á nógv hægri stigi, enn vit kenna til heima í Føroyum.



*Heini Hanusarson var aftur hesa ferð toppskjútti á føroyska liðnum*
*Mynd: Alexander Wagner*

# Undir nógv harðari trýsti

**– Dysturin leygarkvøldið minti ikki um tann mikukvøldið, tí hesa ferð vórðu vit settir undir nógv størri trýst, sigur Dia Midjord, landsliðsvenjari**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Frá einum tapi við sjey málum mikukvøldið, rendi føroyska hondbóltslandsliðið seg leygarkvøldið í eitt dupult so stórt tap niðri í Sveis. Mótstøðuliðið var tað sama og tað var eisini mannað við somu monnum, sum mikukvøldið spældu á Hálsi í Havn. Men so var ikki nógv meira til felags.

– Teir spældu heilt øðrvísi hesa ferð, og tað sæst sjálvandi aftur á úrslitinum. Dysturin leygarkvøldið minti ikki um tann mikukvøldið, tí hesa ferð vórðu vit settir undir nógv størri trýst, sigur Dia Midjord, sum saman við Kára Nielsen tekur sær av at venja føroyska hondbóltslandsliðið.



*Føroysku spælararnir – her Hans Áki Dal-Christiansen í atsókn á strikuni – royndu at stríðast sum frægast, men landsliðsvenjarin staðfestir, at so hvørt sum orkan gekk undan, var eisini minni skil á føroyska spælinum*
*Mynd: Alexander Wagner*

– Vit spæla skilagott í fyrru helvt av fyrra hálvleiki og eina løtu í seinna hálvleiki, men við tí støðuga trýstinum, sum sveisarar løgdu á okkum, hvarv eisini alt tað skilagóða í spælinum hjá okkum.

## Nógv einmansavrik

Hann sigur, at í venjingunum undan hesum seinna dystinum høvdu teir lagt dent á at fáa vart seg fyri skjótáloppunum hjá sveisarunum, sum mikukvøldið kostaðu nógv mál. Menn vóru eisini raskir at renna aftur og fyribyrgja hesum, so leingi, teir orkaðu tað.

– Men tá orkan fór at ganga undan, sluppu sveisararnir aftur at leypa á við somu ferð, sum vit sóu teir gera tað mikukvøldið. Ein onnur avleiðing av, at orkan gekk undan, var so skilaloysi í spælinum, ið vit sóu alt ov nógv til, sum dystinum leið. Og tað gjørdist ov nógv til einmansavrik, heldur enn at arbeiða saman um tingini, sigur Dia Midjord.

– Hvørki tol ella friður vóru yvir føroyska spælinum, og hóast vit høvdu avtalað, at vit skuldu royna at fáa mál upp á 100 prosents kjansirnar, so kláraðu vit ikki at uppfylla tað. Menn royndu at enda at fáa mál upp á 30 ella 40 prosents kjansir, og tá vóru sveisararnir skjótir at svara aftur, so skjótt sum teir fingu bóltin aftur.

## FAKTA um dystin

**EM-undankappingin, bólkur 2**
**Sveis-Føroyar 35-21 (15-8)**
10 min: 5-3
20 min: 9-5
30 min: 15-8
40 min: 21-12
50 min: 30-18
**Málskjúttar**
**Føroyar:** Heini Hanusarson 8, Sámal Joensen 4 (1), Finnur Hansson 3, Carl Herup Olsen 3, Hans Áki Dal-Christiansen 1, Regin Joensen 1, Ingi Olsen 1
**Sveis:** Marco Kurth 6, Manuel Liniger 6 (1), David Graubner 5, Andre Schmid 5, Daniel Fellmann 3, Marko Vukelic 3, David Parolo 2, Martin Engeler 1, Fabian Ganziger 1, Marcel Hess 1, Mathias Oltmanns 1, Iwan Ursic 1
**Brotskøst:** Sveis 3, Føroyar 1
**Ávaringar:** Sveis 2, Føroyar 3
**Útvísingar:** Sveis 5, Føroyar 5
**Diskvalifikatión:** Føroyar 1
**Dómarar:** Vahit Ersan & Faruk Akman (Turkaland)
**EHF-eygleiðari:** Alex Klein (Ísrael)

## Millum tey góðu

Dia Midjord staðfestir, at tað er sera torført hjá Føroyum at spæla ímóti góðum liðum, og hann kundi leygarkvøldið frá síðulinjuni síggja, at Sveis veruliga telist millum góðu liðini.

– Í styrkismetingini er Sveis triðbesta liðið í okkara bólki, so tað sigur seg sjálvt, at mótstøðan er stór. Serliga, tá teir á heimavølli spíla seg út og veruliga gera tað súrt fyri okkum, so verjan alla tíðina var undir stórum trýsti, sigur landsliðsvenjarin, sum nú skal fyrireika seg til teir síðstu EM-dystirnar, sum allir verða í juni.

– Tað gevur okkum sjálvandi møguleika at samla hópin oftari, enn vit hava fingið gjørt tað nú, so tá fara vit at arbeiða meira miðvíst við nøkrum evnum, so vit á ávísum økjum kunnu gera framstig. Tá verða tað eisini sterk mótstøðulið, men vit mugu bara royna at fáa sum frægast burturúr.